gult10 cyan10 magenta10 svart10



# Grør um gangandi fót




*Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavík við fundamentið til goymslusiloirnar, sum bygdar verða í samband við, at Runavík er vorðin útgerðahavn, nú farið verður at leita eftir olju undir Føroyum*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Tað gongur við fullari ferð í Runavík. Kommunan er í vøkstri, og vinnulívið er rættiliga komið í gongd aftur eftir kreppuna**

KOMMUNUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*

**Runavík:** Runavíkar Kommuna fær fyrispurningar næstan hvørja viku frá fyritøkum, sum ætla sær í gongd við einumhvørjum virksemi. Fólkatalið veksur, og arbeiði er til allar hendur.

Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavík, er ein væl nøgdur maður. Hann stýrir eini kommunu í blóma og sum hevur útlit til at verða verandi í oddinum eina tíð enn.

Men tað krevur sín mann at stýra eini kommunu við slíkari ferð, sum Runavíkar Kommuna hevur í løtuni. Og Rodmundur Nielsen heldur, at við hvørt kann tykjast, sum tað gongur nóg skjótt. Hann metir ikki, at ferðin eigur at økjast mundandi. Men vísir samstundis á, at fólk í kommununi tykjast hava tamarhald á tí, tey gera. Ongar villar ætlanir eru, sigur hann, og tær, sum eru í gongd, tykjast væl umhugsaðar og undirbygdar.

## Standa trygg

Fólk í Runavíkar Kommunu eru ikki gliðin í oljuni, sigur borgarstjórin. Bæði vinnan og vanligi borgarin tykjast taka tað reiðiliga avslappað, at Runavík er vorðin útgerðarhavn hjá eini møguligari komandi oljuvinnu.

Talan er jú í fyrsta umfari bara um eina leitingartíð upp á trý ár, vísir borgarstjórin á. Og verður eingin olja funnin, skal eisini livast aftan á ta tíð.

– Og tað skal tað fyri tann skuld kortini, tá oljuvinnan einaferð er av, sigur Rodmundur Nielsen, sum leggur dent á, at hann fer altíð at virka fyri, at verandi vinnan fær góðar møguleikar at arbeiða undir og støðugt fer at menna seg.

Borgarstjórin í Runavík dylur tó ikki fyri, at hann heldur hetta vera eina sera spennandi tíð. Útgerðarhavnin er løgd í Runavík, og sjálvandi fer kommunan at gera møguleikarnar so góðar sum gjørligt fyri at veita oljuvinnuni ta tænastu, hon hevur brúk fyri í leitingartíðini. Og verður olja funnin, verður Runavíkar Kommuna sjálvandi eisini klár at taka í móti eini veruligari vinnu, sigur hann.

## Dryppar longu

Hóast eingin verulig gongd er komin á oljuvinnuna enn, er kortini farið at dryppa eitt sindur.

Runavíkar Kommuna er í ferð við at byggja havnarlagið út, soleiðis at útgerðarhavnin fær støð fyri seg sjálva norðan fyri verandi havnarlag. Hendan útbyggingin dregur eitt sindur út og verður helst ikki klár at taka í nýtslu endaliga fyrr enn komandi ár. Til ta tíð verður neyðugt hjá vinnuni at klára seg á verandi havnarlagi, sigur borgarstjórin.

Í løtuni verða fundament til siloir, sum skulu goyma ymisk evni, sum brúkast skulu til boringarnar, gjørd á havnarlagnum norðan fyri pakkhúsið hjá Skipafelagnum Føroyar.

Neyðugt er at gera hesi fundamentini nú, sigur Rodmundur Nielsen, soleiðis at tey fáa tíð at styrkjast, til sjálvar siloirnar verða settar upp einaferð í mai mánað.

Ætlandi skuldu royndarboringarnar byrja umleið fyrsta juni, og tað verður eingin trupulleiki yvirhøvur at fáa siloirnar lidnar til ta tíð, sigur borgarstjórin í Runavík.

Eisini eru longu bílagdir bústaðir til fólk, sum fara at arbeiða við leitingini. Talan er um fleiri bústaðir, sigur borgarstjórin.

Her eiga vit at fara eitt sindur hóliga fram, heldur Rodmundur Nielsen. Hann vísir á, at longu nú eru húsaprísirnir við at koma á eitt slíkt støði, at tað ikki er fyri vanlig fólk at fylgja við. Eitt nú eru dømi um í høvuðssaðarøkinum, at prísirnir eru tað dupulta av tí, sum teir reelt áttu at verið.

Oljuvinnan fer uttan iva at hava ókenda ávirkan á okkara samfelag, ávarar borgarstjórin í Runavík. Ávirkan, sum vit yvirhøvur ikki hava fantasi til at ímynda okkum. Og hann mælir staðiliga fólki til at hava bæði bein væl og virðiliga á jørðini og ikki fara á glið, um olja fer at flóta rundan um okkum.

Men tað verður ikki lætt, ásannar hann. Tað hava vit sæð aðrastðani, har oljuvinnan hevur givið pengar.

Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavík, sigur, at sjálvandi vónar hann, at oljuvinnan, eisini í leitingartíðini, fer at kasta vinning av sær til Runavíkar Kommunu. Hann væntar, at okkurt fer at liggja eftir til vinnuna á landi.

Men hann vísir á, at tað verður ein stór avbjóðing hjá bæði kommunalu myndugleikunum, vinnuni og vanliga borgaranum, at vísa, at tey klára at loysa tær uppgávur og avbjóðingar, sum ein slík vinna fer at hava við sær.

gult11 cyan11 magenta11 svart11



# Ein spennandi tíð

**Tað liggja stórar avbjóðingar fyri framman hjá Runavíkar Kommunu. Fólkatalið veksur, og mentanartilboðini skulu nøktast, sigur borgarstjórin**

KOMMUNU-POLITIKKUR
*Edvard Joensen*



*Hans Petur Elingsgaard, formaður í mentanarnevnd Runavíkar Kommunu, og Rodmundur Nielsen, borgarstjóri, á graslíkisvøllinum, sum nú verður skiftur út*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Runavík:** Skúlamálið skal loysast, fótbóltsvøllurin gerast av nýggjum, og eitt mentanarhús skal helst eisini byggjast, sigur borgarstjórin í Runavík um tær ætlanir, sum eru fyri mentanarpolitikkin í kommununi.

Runavíkar Kommuna er í støðugum vøkstri. Fólk flyta til, og stórur áhugi er fyri grundstykkjum, sigur borgarstjórin.

Í ár eru longu 10 grundstykki seld, og útstykkingin við Høgaleiti er við at verða útseld.

Tað hevur annars staðið í stað seinnu árini. Í 1989 vóru 120 umsóknir um grundstykki á bíðilista. Men tá kreppan kom, hvarv tann listin, og fólk vildu heldur selja grundstykkini aftur. Men nú ganga grundstykkini aftur sum heitt breyð, sigur Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavík.

Í dag búgva beint oman fyri 2.500 fólk aftur í Runavíkar Kommunu. Tá mest var áðrenn kreppuna, búðu 2.543 fólk í kommununi.

Men tað krevur eisini nakað av kommunalu myndugleikunum, at fólk flyta til økið. Fólk mugu hava tilboð til frítíðina eisini, skulu tey støðast, ásannar borgarstjórin.

Eitt mál, sum borgarstjórin í Runavíkar Kommunu vil hava loyst í ár, er skúlamálið.

Runavíkar Kommuna røkkur víða, og skúlarnir eru spjaddir allan vegin úr Søldarfirði til Rituvíkar. Tað ger, at nógv ferðing er millum skúlarnar,og tað krevur bæði tíð og orku. Haraftrat kemur, at skúlabygningarnir eru gamlir og í ávísan mun eisini niðurslitnir.

Tað hevur leingi verið eitt ynski, at fáa eina endaliga loysn á skúlamálinum, og tað fer at verða arbeitt álvarsliga fram í móti at fáa hana avgreidda í hesum árinum, sigur Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavík.

Eitt annað mál, sum er við at koma fram aftur, er eitt mentanarhús í kommununi. Hetta er gamalt mál, sum hevur verið uppi fyrr, men sum eins og so nógv annað, datt niður fryi aftur, tá kreppan legði alt slíkt undir lok í síni tíð.

Tað er eitt mentanarfelag í kommununi, sum eigur eitt sindur av pengum, greiðir borgarstjórin frá. Og sum skilst á honum, eru vónir til, at eitt ávíst samstarv millum hetta felagið og kommununa ikki er heilt óhugsandi, soleiðis at ætlaða mentanarhúsið kann gerast veruleiki.

Eisini ítrótturin í sóknini skal hava betri umstøður, hóast tær eru rímiliga góðar sum er. Ítróttarhøll og fótbóltsvøllur eru í Runavík. Men júst fótbóltsvøllurin er soleiðis fyri, at honum tørvar álvarsligar ábøtur.

Tær fær han so eisini nú í summar. Einaferð í mai, juni verður alt graslíkið tikið oman av, og nýggjur vøllur lagdur á aftur. Hesin vøllurin verður tann fyrsti av sínum slag í Føroyum, sigur borgarstjórin.

Vølurin verður skiftur, áðrenn landskappingin í fótbólti er komin i helvt, og tí verður neyðugt hjá NSÍ at spæla sínar heimadystir á Svangaskarði, meðan arbeiðið verður gjørt í Runavík.

Tað fer at kosta umleð 1,6-1,7 milliónir krónur at fáa nýtt graslíki á vøllin í Runavík.

# Runavíkar Sjómansheim latið uppaftur

**Eftir at hava verið stongt eina tíð letur Runavíkar Sjómansheim nú uppaftur. Tað verður tó ikki við øllum tí virksemið, sum var. Byrjað verður sum Bed and Breakfast. Matstovan verður ikki opin**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

Tað verður nú aftur møguligt at gista í Runavík. Sjómansheimið, sum hevur verið stongt eina tíð, lat upp aftur í gjár, og longu nú eru fleiri fyrispurnignar komnir.

Jeffrei Johannesen, nevndarlimur, sigur, at í fyrsta umfari verða bara gistingar við morgunmati á Sjómansheiminum. Avtala er gjørd við Judith og Meinhard Hansen av Nesi um at leiða Sjómansheimið. Men tey hava tó bara átikið sær at verða har fyribils í summar, og vilja ikki taka matstovuvirksemið upp á seg. Arbeitt verður tí við at finna onkran, sum kann átaka sær dagligu leiðsluna av Sjómansheiminum, sigur Jeffrei Johannesen.

Hann sigur, at tað fíggjarliga nú er komið upp á pláss. Kreditoravtalur eru gjørdar við eitt nú Føroya Sparikassa og eisini leysar kreditorar.

Í samband við at Runavíkar Sjómansheim lat aftur, vóru søgur frammi um, at ein einstakur persónur var komin fíggjarliga illa fyri, tí hann hevði veðhildið fyri eitt lán til Sjó-mansheimið. Jeffrei Johannesen sigur, at hetta málið er loyst soleiðis, at maðurin sleppur snikkaleysur burtur úr tí.

Ætlanin er at reka Sjómansheimið víðari eftir sama leisti sum fyrr. Talan verður undir ongum umstøðum um at søkja um skeinkiloyvi, so leingi talan er um Sjómansheim, sigur Jeffrei Johannesen.

Hann ásannar, at tað kann fara at verða tungt at reka matsovu virksemi uttan skeinkiloyvi. Men samstundis vísir hann á, at tað er ikki matstovan, men gistingarnar, sum skulu bera raksturin.

– Tað ber til aðrastaðni at reka missiónshotell á rættiliga høgum støði uttan minibarr á kamarinum. Hugt verður at, hvussu kamarið annars er útgjørt. So tað átti at borið til í Føroyum eisini, heldur hann.

Jeffrei Johannesen sigur, at tey arbeiða við onkrum ávísum avtalum í løtuni. Eitt nú eru fyrispurningar frá fólki, sum koma hendanvegin at arbeiða í samband við oljuútgerðarhavnina í Runavík. Eingin endalig avtala er enn gjørd, men hugsandi er, at okkurt fer at spyrjast burturúr, væntar hann.



*Runavíkar Sjómansheim er latið upp aftur sum Bed & Breakfast*
*Savnsmynd*


